# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Bróðurhond

Millum Ísland og Føroyar eru gomul og søgulig bond, og tjóðirnar eru nær skyldar mentanarliga. Vit vóru í ríkisfelagskapi í øldir og við hesi skipan í lagnufelagskapi, ið jaliga hevur merkt viðurskiftini millum okkara tjóðir til hendan dag. Íslendingar hava mangan sýnt seg sum sannir vinir. Hetta er komið til sjóndar á ymsan hátt, eitt nú við at føroyingar sum teir einastu fingu sersømdir, tá Ísland flutti sjómarkið út á 200 fjóðringar. Hetta hendi uttan, at mótrokning av nøkrum slag og var henda avgerð tí ein sonn vinargerð, ið føroyingar ongantíð eiga at gloyma.

Ísland er nú kunnugt komið í stórar fíggjarligar trupulleikar og mangt bendir á, at álvarsamir búskaparligir trupulleikar fara at koma í kjalarvørrinum á kreppuni. Landið hevur tí stóran tørv á gjaldføri. Íslendingar hava sýnt mikið áðræði og vóru fyrstir at gagnnýta altjóðagerðina. Ásannast má, at teir hava dugað væl at troyta teir møguleikar, sum vístu seg, tá allur heimurin so at siga gjørdist ein marknaður. Teir hava dugað væl at rikið sínar altjóða fyritøkur og hava statsað stórt – ov stórt, kann onkur halda. Hinvegin eru størri og sterkari tjóðir enn brøðratjóðin í somu trupulleikum.

Vit í Føroyum vita eitt sindur um hetta at vera í ovurstórum fíggjar- og búskapartrupulleikum og vit hava á egnum kroppi merkt, hvussu tað kennist at standa einsamøll við trupulleikunum. Vit fingu í nítiárunum beiskar royndir, sum seint verða gloymdar. Tað er tí bæði rætt og gott, at Føroyar nú rætta Íslandi bróðurhond, soleiðis, sum tíðindini úr Helsingfors boða frá. Í gjár í Helsingfors í samband við aðalfundin í Norðurlandaráðnum hittust umboð fyri Føroya Landsstýri og Íslendsku Stjórnina. Á fundinum vóru Kaj Leo Johannesen, løgmaður, Jørgin Niclasen, uttanríkisráðharri, Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri og Geir Haarde, forsætismálaráðharri og Árni M. Mathiesen, fíggjarmálaráðharri. Trupla støða Íslands varð umrødd serstakliga tørvurin á gjaldføri. Landsstýrið hevur frammanundan samráðst við flokkarnar á Løgtingi um málið. Allir flokkar taka undir við ætlanini at veita Íslandi gjaldførislán. Á fundinum boðaðu føroysku umboðini frá, at Føroyar eru sinnaðar til at veita Íslandi eitt gjaldførislán 300 milliónir. Upphæddin verður tikin av innistandandi í Landsbankanum. Tað er einki at ivast í, at allir føroyingar fegnast um og taka undir við hesi avgerð, sum er eitt sjálvsagt lógvatak til brøðratjóðina fyri vestan hav. Vit høvdu herfyri oddagrein, har vit harmaðust um støðuna í Íslandi. Í greinini, sum hevði gamla orðatakið Bert er bróðurleyst bak sum yvirskrift, vístu vit á, hvussu einsamallir frændur okkara stóðu í hesi kreppu, sum hevur verið um at taka heimsins sterkastu lond av fótum. Tað er tí gleðiligt, at Norðurlond og við teimum eisini Føroyar nú rætta Íslandi bróðurhond. Vit eiga at umhugsa at lata lánið rentu- og avdráttarfrítt í eini fimm ár.

Sosialurin

## Vit royna at gera okkara arbeiði, Edmund



**JÓN BRIAN HVIDTFELDT**
Tíðindaleiðari Kringvarp Føroya

**Viðmerking til løgtings- og fólkatingsmann, hvørs spunasmiður gloymdi, at tað framvegis finnast journalistar í Føroyum**

Edmund Joensen finst í lesarabrævi á tíðindaflutningin eftir tíðindafundin hjá Sambandsflokkinum í síðstu viku. Hann eftirlýsir beinleiðis, at fjølmiðlarnir spæla við. Og so skírir hann í sama andadrátti fjølmiðlarnar at dyrka ta politisku ósemjuna og halda mikrofonunum, heldur enn at fara kritiskt inn í substansin í málinum og lýsa tað frá ymsum síðum. Heilsanin frá løgtings- og fólkatingsmanninum er beinleiðis vend móti Kringvarpinum, sum partú skal spæla við. Tí, sum Edmund Joensen orðar seg: "Tit í almennu fjølmiðlunum hava eina public service skyldu móti tí samfelag, ið rindar tykkara lønir. Hesa skyldu mugu tit taka í álvara."

Jú, Edmund Joensen. Púra rætt. Og tað var júst hesa skyldu, sum vit royndu at taka í álvara, tá vit umrøddu og viðgjørdu boðskapin, ið var førdur fram á tíðindafundinum hjá Sambandsflokkinum í síðstu viku. Vit lurtaðu eftir tínum boðskapi og viðgjørdu hann kritiskt. Royndu eftir førimuni at seta hann inn í ein samanhang. Fingu viðmerkingar frá relevantum persónum. Og so gjørdu vit okkum eisini tann ómak at fregnast hjá tí parti, sum tú so dúgliga refereraði frá á tíðindafundinum. Vit royndu at gera okkara arbeiði – at røkja okkara public service skyldu.

Tí burdi tú heldur skotið eftir tínum egna spunasmiði og hartað hann fyri ikki at gera sína skyldu móti tær, heldur enn at skotið eftir Kringvarpinum. Tú rindar hansara løn, og kann fáa hann til at gera tað arbeiði, ið tú rindar fyri. Nevniliga at fáa tín boðskap fram. Men Kringvarpið hevur ikki skyldu til at halda mikrofonina fyri Edmundi Joensen, og so annars takka fyri, tá tín setningur er sagdur. Vit royna at gera okkara arbeiði, og halda tað annars vera sera ósømiligt av tær sum tvífaldum fólkavaldum politikara í tveimum parlamentum at toga fram, hvør rindar okkara lønir og nærum brúka hetta sum alibi fyri at gera okkum til tín persónliga boðbera. Allir føroyingar gjalda og eiga Kringvarpið, og tað er júst tí, at vit kunnu loyva okkum at seta óheftni og kritiskan tíðindaflutning sum ovastu raðfesting.

Tá hetta er sagt, so vil Kringvarpið sjálvandi vera við til at seta fokus á Evropapolitikkin hjá landsins leiðslu – bæði í tíðindaflutningi og kjaki annars. Men skulu vit gera tað, so mugu vit eisini sleppa at tosa við onnur enn teg, Edmund.

## Íbúðartrotið í Tórshavnar kommunu



**HALLA SAMUELSEN**
býráðslimur, valevni hjá Javnaðarflokkinum

Stórt trot er á íbúðum í Tórshavnar Kommunu. Kommunan eigur at lata byggja íbúðir/kollegiir, so at fólk, ið ganga í skúla ella eru undir útbúgving, kunnu hava møguleika at eiga, ella leiga ein bústað.

Her hugsi eg eisini um stakar uppihaldarar, ið eiga at hava møguleika fyri at leiga. Og fyri at tað ikki skal verða so dýrt eigur Føroya Løgting at broyta lógina soleiðis, at stakir uppihaldarar, sum leiga frá Tórshavnar Kommunu, kunnu fáa ágóðan av rentustuðlinum. Tað hevði hjálpt sera væl hjá teimum.

Tey sum eru sálarliga sjúk, hava ofta trupulleika við at fáa nakað at búgva í. Tey eiga eisini at hava møguleika til at leiga sær íbúð frá Tórshavnar Kommunu.

Eisini er stórt trot á íbúðum til eldri fólk. Tað eru nógv eldri fólk, sum sita í alt ov stórum húsum, sum tey fegin vildu sloppið av við, um tey høvdu møguleika fyri at flyta inn í eina eigaraíbúð ella leiguíbúð, um slíkar vóru til taks frá kommununi.

Kommunan eigur ganga á odda við at byggja íbúðir, so fleiri og betri møguleikar verða hjá borgarunum at finna júst tann bústaðin, sum teimum tørvar.

Fái eg tín stuðul til býraðsvalið 11. november, ert tú við til at betra um bústaðarmøguleikarnar. Eg skal so skal eg gera mítt til at hetta mál verður loyst skjótt og væl.

X viðlista C

## Meðan vit bíða



**SIGRÚN MOHR**
valevni Sjálvstýrisfloksins fyri Havnar kommunu

Meðan bíðað verður eftir at fleiri røktarstovnspláss verða tøk, mugu land og kommuna í felag finna loysnir, tí støðan er vónleys hjá nógvum borgarum í Tórshavnar kommunu.

Heimatænastan má fáa skipaða tilkallivakt um náttina - tað hevði bøtt nakað um støðuna hjá teimum, ið hava hjálp fyri neyðini heima.

Dagtilhald er ein góð íløga fyri tann, ið tekur av tí tilboðnum. Landsbúskaparliga er hetta eisini ein fongur, tí kanningar aðrastaðni vísa, at hesi tilboð eru røktarheimsfyribyrgjandi, íløgan er ikki so stór, og raksturin er nógv bíligari enn til búplássini.

Tí er av alstórum týdningi, at vit fara at viðgera og ráðleggja, hvussu hetta økið skal skipast í framtíðini - tvørtur um valskeiðini og ikki bara fýra ár inn í framtíðina.

Hetta er eitt av málunum, ið eg fari at virka fyri.

www.sjalvstyri.fo

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.